# Narva til minnis

Tað var ísakalt uttanvert skipssíðuna hetta kvøldið. Men uppaftur kaldari kendist tað, tá boðini um, at Narvi var farin, bert 48 ára gamal, bórust yvir telefonina.

Narvi varð føddur í Hvalba, miðlingur av trimum brøðrum. Har sleit hann sínar barnaskógvar í einari bygd við so nógvum avbjóðingum fyri ein óvita, hugsast kann. Vaks upp vesturi á Heyggi. Har var tað Heygsvatn og Fiskieiði, ið vóru tey mest spennandi spæliplássini, ein kundi hugsa sær. Ein so djarvur unglingi, sum Narvi var, lat sær ikki siga tvær reisur. Saman við sínum javnaldrum, sum tá vóru nógvir í tali á Heyggi, vóru hesi pláss á skránni nærum dagliga. Men líka so djarvur, hann var, líka so lítillátin var hann. Gjørdi ongan háva burtur úr sær sjalvum. Altíð við tí góða orðinum og einum smíli, ið dróg menniskju at sær. Soleiðis var Narvi, óansæð nær ein møtti honum.



Tá barnaskúlin var liðugur, var tað sjógvurin, ið dróg. Sigldi trúliga til hann fór á sjómansskúlan at nema sær útbúgving. Fann sær konu av Strondum, har hann setti búgv. Sigldi í nógv ár sum stýrimaður hjá Torm og var sum vera man nógv avhildin. At hann sum stýrimaður hevur rættað manga kósina fyri ymisk frávik, er sjálvsagt. Men tann kósin hann setti sær frá barnsbeini av helt líka til tað síðsta. Tað var undrunarvert so avkláraður tú vart, hóast tú viknaði dag fra degi. Alt tað myrka og dapra, sjúkan hevði við sær, kláraði hon ikki at kúga títt lætta og ljósa lyndi.

Ein kundi skrivað so nógv um Narva, men tað verður alt ov drúgført i einum vanligum dagblað. Kann tó ikki lata vera við at minnast aftur á allar biltúrarnar við tær. Alt tú visti at greiða frá um bilar var nakað heilt fyri seg. Síðan tíðina saman til skips, har tú heldur ikki smæddist burturímillum. Hetta eru minni, ið fløva, ein tíð, ið ikki kemur aftur.

At enda vil eg minnast teg Asbjørg og børnini. Móðir og brøðir tínar og teirra kæru. Tit hava mist ein, ið stóð tykkum nær og var góður við tykkum. Má Harrin styrkja tykkum í tíðini, ið kemur. Narvi er har, sjúka og pína ikki er longur. Tad var tað, hann bygdi sítt álit á.

Við hesum fáu orðum vil eg lýsa frið yvir Narva.

**Frændi**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Hans Andrias Olsen, úr Árnafirði**, andaðist mikudagin á Sambýlinum á Heygnum, 80 ára gamal kistan fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi heim í Christianskirkjuna, leygardagin kl 18.00. Jarðarferðin verður úr Christianskirkjuni sunnudagin kl.13.30. Tey, ið vilja minnast Hans Andrias, kunnu lata eina peningagávu til kirkjuna í Árnafirði, konta í Norðoya Sparikassa.

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra mamma, vermóðir, omma og langomma okkara

**Karen Lykke Gregoriussen**
Tórshavn

andaðist og varð jarðað.
Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur.
Tøkk til Hera Joensen, prest.
Tøkk til sangararnar.
Tøkk til tykkum, ið hjálptu til við ervinum.
Tøkk til heimahjálpirnar
Ein serstøk tøkk til Ingrid, Esther og Súsonnu.
Og tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu henni seinasta teinin.

*Familjunnar vegna*
**Birna og Beinta**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu, tá okkara elskaði maður, pápi, verpápi og abbi

**Páll Sandá**
Vágur

gjørdist sjúkur, doyði og varð jarðaður.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir, vitjanir, uppringingar og peningagávur til Meinigheitshúsið.
Tøkk til heimahjálparar, heimasjúkrasystrar og Suðuroyar Sjúkrahús.
Eisini ein stór tøkk til tykkum, sum vitjaðu Páll í heiminum, meðan hann var sjúkur.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.
Eina stóra tøkk til øll tykkum, sum hjálptu til við ervinum.

*Vegna tey avvarandi*
**Selma**
**Majken, Eileen, Anja, Bárður og Sonni við familjum**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Tolina Højgaard**
Vestmanna

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til starvsfólkið við Neyst fyri kærleika og góða røkt. Takk til Hansy Skarðsá fyri góð orð og vakrar tónar á Mørkini. Takk til Agnar Nielsen og Ingu Dam, prest, í kirkjuni.
Eisini ein tøkk til Óla Jacobsen fyri góð orð. Takk til kirkjutænarar, sangarar, berarar og gravarar og øllum tykkum, ið hjálptu til við jarðarferðini.
Takk fyri blómur, kransar og peningagávur til missiónshúsið og tykkum sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*
**Tova og Hans**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum øllum, sum sýndu samkenslu, tá mamma, vermamma, omma, langomma og oldurommma okkara

**Svenhilda Olsen**
vanliga nevnd Hilda
á Toftum

andaðist og varð jarðað.
Tøkk til tykkum, sum við umsorgan vóru um hana, á sjúkralegu hennara.
Takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Takk fyri hjálpsemi við jarðarferð og ervið.
Takk til prest fyri troystarrík orð, takk til kirkjutænarar og sangarar.
Takk fyri blómur, kransar og gávur til Missiónshúsið.

*Familjunnar vegna*
**Børnini**